# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Ditlev Hammer** fer úr kapellinum á Suðuroyar sjúkrahúsi mikudagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Hovs kirkju hósdagin kl. 12.30.

**Katrina Malena Bø, fødd Justinussen, vanliga nevnd Trinelena, ættað úr Svínoy**, andaðist á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi leygardagin, 89 ára gomul. Kistan fer frá Ellisheiminum mikudagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Glyvra kirkju hósdagin kl. 14.

**Astrid Vørðhamar, Fuglafjørður**, andaðist sunnudagin, 91 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Siloa hósdagin kl. 13.

## Dagurin

**11. november . Mortansmessa.** Til minnis um biskupin Martin í Tours í Fraklandi. Hann var føddur í tí, sum nú verður rópt Ungarn. Mortan er verndarhalgimenni hjá øllum húsdýrum og hjá drykkjumonnum.
Navnið er latínskt og merkir stríðshugaður.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

# MERKISDAGAR

**80 ára føðingardagur**
Týsdagin 17. nov. fyllur Cederfeldt Olsen, Tvøroyri, 80 ár. Dagurin verður hildin í heiminum, Sjógøta 250, leygardagin 14. nov. Opið hús frá kl. 12 .

**90 ára føðingardagur**
Sunnudagin 15. nov. verður Tórálvur Poulsen Skopun 90 ár. Tey sum vilja heilsa uppá Tórálv, eru hjartaliga vælkomin í Samljóð í Skopun millum kl. 14 og 19 sama dag.

**Silvurbrúdleyp**
Sunnudagin 18. okt. høvdu Birgit og Hanus Hansen, klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 12. des. kl. 19 í Badmintonhøllini í klaksvík. Tey sum ynskja at gleðast saman við silvurbrúðarparinum, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 227479 ella 455592. Ella við at skriva til: bsh@post.olivant.fo áðrenn 3.desember.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 24. nov. hava hjúnini Oluffa og Niels Andreasen, Klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verur hildin í K.F.U.M & K Klaksvík, fra kl. 18, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
30. nov. hava hjúnini Alberta og Eirikur Magnussen, Tórshavn, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 28. nov. í HB-Húsinum kl. 19. Tey ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga fra á tlf. 216324 (Alberta) ella 214456 (Eirikur) innan 14. nov.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 29. des halda við bæði, Pálin og Henry Olsen, Rituvík okkara silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin við veitslu í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tit, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 219134 (Henry) ella 223534 (Pálin). Til ber eisini at senda ein teldupost: henry-o@olivant.fo ella palin.olsen@skulin.fo áðrenn 15. desember.

**Gullbrúdleyp**
28. nov. hava hjúnini Tóra og Ólavur Nolsøe Olsen, Fuglafjørður, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdahúsinum í Leirvík leygardagin 5. des. kl. 18. Tey ið vilja halda dagin saman við okkum, kunnu siga frá á tlf. 444159 - 737751 ella toraolavur@gmail.com áðrenn 20. nov.

**Diamantbrúdleyp**
Mánadagin 9. nov. hava Amalie og Jens Mouritsen, Sørvágur, verið gift í 60 ár. Dagurin verður hildin 14. nov. frá kl. 18 hjá soninum, á Magnusarbø 6, Sørvágur.

# Kári Svensson í Listaglugganum




*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hósdagin kl. 16 letur Kári Svensson upp framsýning í Listaglugganum í Dr. Jakobsensgøtu 15. Hetta er aðru ferð at Kári hevur stakframsýning í Listaglugganum. Málningarnir, sum eru við á framsýningini, eru allir málaðir í ár. Tað er ikki nakað serstakt evni fyri framsýningina, men flestu myndirnar eru sokallaðar náttúrulýsingar og myndevni úr Havn.

Upprunin til málningarnar byrjaði við at Kári og ein vinmaður hansara, ein danskur listamaður, ferðaðust kring landið í summar og teknaðu – ella skitsaðu, sum Kári tekur til. Kári sigur: “Vit ferðaðust kring landið av Viðareiði til Nólsoyar og til Suðuroyar og skitsaðu í dagavís – hesar skitsurnar eru grundarlagið undir teimum málningum, eg sýni fram”.

Í bókini Livandi List eftir Inger S. Sørensen, verður m.a. sagt:” Fyri okkum, ið dáma málningar og halda, at málningurin ikki er afturhaldssinnaður, er tað frígevandi, at nakrir listamálarar mála uttan himpr og tora at vísa teirra kærleika til málningin.”

Kári Svensson hevur alsk til málningin og myndevni, og hann málar uttan himpr. Hann hevur eina tíð haft støðufesti við síni myndevni, og vit merkja, at hann hevur dygdartryggja hesi. Málningarnir eru væl kjølfestir í myndevnunum og hava tað neyðuga abstrakta frælsi, sum Kári eygleiðir í náttúruni. Málningarnir eru flest allir góðir og undirstrikar hettar, at heildin virkar sera góð, sum aftur førir við sær, at framsýningin verður viðmæld øllum at skoða. Nýggju hølini hjá Listaglugganum eru virðiligir karmar um framsýningina og sum heild væl egnaði til framsýningar.

Framsýningin er opin í frá 12. november og tvær vikur fram, týsdag til fríggjadag, kl. 15.00 –17.30 og leygardag kl. 11 –14.

# Við Charley og Halli á palli

Heimskendi countrysangarin Charley Pride trínur á pallin í Ítróttarhøllini á Hálsi í Havn sunnukvøldið 22. november.

Eisini hevur okkara heimligi countrysangari Hallur Joensen útgávukonsert við einum nýggjum føroyskum Charley Pride sangi. Hallur fer at syngja við egnum orkestri. Talan er um eitt stórsligið tiltak sum HB-Stuðlar skipa fyri.

Charley kemur ikki einsamallur. Saman við honum eru sonurin Dion og Stephen, sum er beiggi Charley Pride, ið eisini fara at framføra.

“The Snake Crawls at Night” var fyrsta stakplátan hjá Charley Pride sum kom út í 1966 og nakað seinni kom “Before I Met You”.

Frá tí at sangurin “All I Have to Offer You is Me” kom út í 1969 fekk Charley Pride sítt heilt stóra gjøgnumbrot. Nevnast kunnu aðrir sangir sum komu um hesa tíðina sum t.d. “I Can’t Believe That You’ve Stopped Lovin’ Me” og “Kiss an Angel Good Morning”, sum eisini er eyðkennissangurin hjá honum.

Charley Pride er føddur í Mississippi í USA tann 18. mars 1938, og er hann sostatt 71 ára gamal, nú hann kemur at vitja okkum við eini sera umfatandi konsert við einum hópi av gomlum slagarum eins og nýggjum sangum. Sum skilst verða eisini kendir jólasangir á skránni á konsertini, sum byrjar kl. 19.

*mg*



*Í ár eru 40 ár síðan Charley Pride fekk sítt heilt stóra gjøgnumbrot við sanginum “All I Have to Offer You is Me”*